# Satt valstríð í Turiðargøtu

**Steinfinnur Mittelstein, Inga Dahl og Tórfinn Smith stríðast hvør í sínum lagi fyri at vinna ávikavist Sambandsflokkinum, Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum atkvøður á kommunuvalinum í Havn týsdagin. Í gerandisdegnum eru tey grannar í Turiðargøtu í Havn**

VALSTRÍÐ Í TURIÐARGØTU
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Steinfinnur. Inga. Tórfinn. Trý tilvildarlig nøvn í stóru rúgvuni av valevnum, sum møguleiki verður fyri at seta krossin við til kommunuvalið týsdagin. Hesi trý hava lítið í felag politiskt, tí tey umboða hvør sín flokk á kommunuvalinum. Hóast hvør sín politiska lit er tað kortini okkurt, sum knýtir tey saman.

Seinastu mongu árini hava Steinfinnur Mittelstein, Inga Dahl og Torfinn Smith verið grannar í Turiðargøtu, sum liggur á Ovara Ternuryggi í Havn. Gøtan hoyrir avgjørt ikki millum tær stóru gøturnar í høvuðsstaðnum, og tí er tað eitt sindur margháttligt, at heili trý valevni eru at finna í somu gøtu, sum ikki telir meira enn góð 20 hús. Til stuttleikar kann leggjast afturat, at fyrrverandi býráðslimurin hjá Sjálvstýrisflokkinum í Tórshavnar kommunu, Ronald Poulsen, eisini býr í Turiðargøtu.

## Heldur B36 og HB

Hetta er fyrstu ferð, at Steinfinnur Mittelstein og Inga Dahl stilla upp til kommunuval. Tey stilla ávikavist upp fyri Sambandsflokkin og Fólkaflokkin. Triðja valevnið er hinvegin royndur í garði. Tórfinn Smith hevur seinastu 20 árini umboðað Javnaðarflokkin í Tórshavnar býráð.

Spurd um tað verður tosað nógv um politikk í Turiðargøta, eru tey skjóta at svara, at tað verður tað ikki.

– Nei vit hava nógv annað at tosa um enn politikk, tá vit eru saman í Turiðargøtu. Vit tosa ómetaliga lítið um politikk, tí okkum dámar nógv betur at syngja og hugna okkum, og ikki minst prika hvønn annan við HB og B36 ella við Neistanum og Kyndil.

»Kunnu grannarnar í Turiðargøtu væntar sær góðar sømdir um øll tit verða vald týsdagin?«

– Ha Ha. Jú vit lova, at vegurin í Turiðargøtu verður gjørdur úr marmor, um vit verða vald, verður sagt skemtandi.

## Tamt valstríð

Steinfinnur, Inga og Tórfinn eru øll á einum máli um, at valstríðið til kommunuvalið í ár hevur verið tamt.

– Nú kenni eg ikki tað at vera í einum valstríði, men sum borgari haldi eg tað hevur verið rættiliga tamt. Tað hava verið rættiliga fáir valfundir, og tað er ikki nógv tú hevur sæð til lýsingar og plaktatir, sigur Steinfinnur Mittelstein

Inga Dahl tekur undir við Steinfinni.

– Tað er rætt sum Steinfinn sigur, men eg haldi ikki tað ger nakað um plakatirnar ikki koma so tíðliga, og um vikuskiftið vænti at síggja fleiri plakatir í býnum. Hinvegin merkir tú væl, at tað verður práta meir og meir um kommunuvalið nú tað nærkast, vísir Inga Dahl á.

Tórfinn Smith er tann mest royndi politikarin av teimum trimum, og hann vísir á, at valstríðið til kommunuval er vanliga tamt.

– Eg minnist ikki nakrantíð, at tað hava verið so nógvir valfundir. Eg minnist kortini ein valfund í Sjónleikarahúsinum, har 15 áhoyrarar møttu, og hvør teirra var valevni. Vit hava við stuttum millumbili havt tvey løgtingsval, og tað merkist sjálvsagt. Tú kanst á ein hátt siga, at bæði luftin og pengarnir eru farnir við hesum valstríðum, heldur Tórfinn Smith.

## Tosa við fólk

Dagarnir til kommunuvalið fækkast, og endaspurturin til valið er farin í gongd. Vit hava spurt Tórfinn, Ingu og Steinfinn, hvussu tey hava rikið til valið í ár.

– Mær tykir sum um, at sitandi býráðslimir hava betri møguleikar, enn vit nýggju, og fleiri teirra hava eisini sterkari fíggjarevni enn nýggju valevnini. Eg havi ikki ráð til stór skelti, sum kosta fleiri 1000 krónur, so eg havi roynt at tosa við fólk, skriva greinar og sent teldupostar, sigur Steinfinnur Mittelstein.

– Hjá mær er tað tað sama. Eg havi fyrst og fremst tosað við fólk, og eg havi eisini skrivað onkra valgrein. Tá tú stillar upp fyri fyrstu er tað lætt at koma í samband við fólk, tí tú fært nógvar reaktiónir og fólk spyrja, hvat tú stendir fyri, og tað er bara stuttligt, heldur Inga Dahl.

– Tað er einki at ivast í, at tað er fótarbeiðið – also prát við fólk – sum telir til kommunuvalið. Stórar plakatir og greinar er bert jólapynt. Eg havi helst verið meira anonymur enn aðrir býráðslimir í samgonguni, og tí havi eg gjørt av at senda eitt faldiblað í hvørt hús hesaferð, men sjálvandi havi eg eisini tosað við fólk, sigur Tórfinn Smith.




*Í gerandisdegnum eru f.v. Steinfinnur Mittelstein, Inga Dahl og Tórfinn Smith grannar í Turiðargøtu í Havn. Týsdagin kappast tey um atkvøður á kommunuvalinum í Havn.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Føroya Felag móti Krabbameini hátíðarheldur 25 ár

**Fjórðingsøld við stórum framstigum og fleiri frambrotum til frama fyri nógvar føroyingar. Tað hevur Føroya Felag móti Krabbameini hug at fagna saman við almenninginum í stórfingnum hátíðarhaldi í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 12. november**

HÁTÍÐARHALD
*tíðindaskriv*

Ein sera spennandi skrá bíðar teimum, ið leita sær í Norðurlandahúsið fríggjadagin í komandi viku at hátíðarhalda, at Føroya Felag móti Krabbameini hevur 25 ár á baki. Nýggjastu hagtølini viðvíkjandi krabbameini í Føroyum verða almannakunngjørd í fyrilestri eftir Erik Wandall, yvirlækna og nevndarlim í Krabbameinsfelagnum, og Kristianna Hammer, ið er sjúkrarøktarrøðingur og cand. cur., fer at halda fyrilestur um at varðveita vónina hóast lívshóttandi sjúku. Jóannes Eidesgaard, løgmaður og verji hjá Føroya Felag móti Krabbameini, og Jákup N. Olsen, formaður í felagnum seinastu nógvu árini, fara at røða. Musikkskúlanæmingar spæla umframt at Martin Joensen, tónaskald og listamaður, fer at framføra eitt nýtt lag.



Í sambandi við hátíðarárið gevur Føroya Felag móti Krabbameini á hátíðardegnum út bók. Bókin eitur Okkara millum og er snotiligt verk, har 20 føroyingar skriva um at liva við krabbameini. Hetta eru fjølbroyttir, bersøgnir og nemandi tekstir skrivaðir av fólki, ið hava verið sjúk av krabbameini, fólki ið hava mist maka ella foreldur, og einum fólki, ið hevur fingið at vita, at tað ikki verður frískt. Umframt verður søgan hjá Føroya Felag móti Krabbameini frá stovnan fram til dagin í dag lýst í stuttum. Turið Kjølbro, ritstjóri, hevur ritstjórnað bókina, og á hátíðarhaldinum fer hon at siga nøkur orð um hana.

Listafelag Føroya hevur latið gera plakat til Føroya Felag móti Krabbameini og á hátíðarhaldinum verður hon almannakunngjørd. Plakatin er listamálningur, ið Torbjørn Olsen, listamálari, hevur málað. Listarverkið, sum eitur Brot, sýnir ljósið við ávarandi skýggjum. Á hátíðarhaldinum fer Pál Weihe, formaður í Listafelag Føroya, at siga nøkur orð um listarverkið og plakatina.

Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna, verður orðstýrari undir hátíðarhaldinum, ið varir góðan tíma. Aftaná býður felagið okkurt leskiligt.

Væl verður gjørt burtur úr, nú Føroya Felag móti Krabbameini rundar fjórðingsøldina. Karmarnir eru góðir, og felagið vónar, at mong leita í Norðurlandahúsið henda dagin. Tiltakið verður í Klingruni 12. november klokkan 14.00. Høvi verður at keypa bókina og plakatina.




# Valevni Sjálvstýrisfloksin

## ...til býráðið í Tórshavnar Kommunu


Øssur Simonsen


Tórbjørn Poulsen


Noomi Juul


Jónas Johnson


Johan Stenberg


Ingeborg Godtfred


Carl August Arge


Klæmint Olsen

# HVØR KANN? - D KANN!

Fyrsta januar gerst øll Suðurstreymoy ein kommuna. Fevnir hon tá um fleiri lands- og bygdaløg. Havnin er og verður tann náttúrligi miðdepilin, ikki bara í kommununi, men í øllum Føroyum. Vit eru stolt av at eiga høvuðsstað landsins. Fyrimunirnir eru nógvir, men eisini vansarnir.

Havnin skal framhaldandi mennast og liva upp til sínar skyldur. Samstundis eigur øll kommunan at fáa lut í menningini. Bygdunum má eisini tryggjast menningarmøguleikar, tær skulu ikki bara var veitast.

Kommunan er ikki bara tann „deiliga" Havnin, men eisini bygdir og oyggjar; firðir, áir og vøtn; haga- og fjallalendi og onnur d rabar náttúra. Vit eiga at røkja hana á skynsaman og bur ardyggan hátt, so hon verður okkum øllum til gleði og sóma.

# Hesum vilja vit arbeiða fyri

**Eldraøki**
Tørvurin á stovnsplássum skal nøktast. Alternativar íbúðir. Ta skal vera lætt at flyta í minni íbúð, tá ein gerst eldri. Betri og brei ari dagtilbo til eldri.

**Íbú arstø an**
Burtur við bíðilistanum til kommunal grundstykkir. Næmingaheim til tey lesandi og lærlingar. Leigulógin skal dagførast. Ongan svartan marknað. Betri og bíligari leiguíbúðir. Býráðið skal virka fyri, at MVG og skattalógin skal broytast, so tað verður gjørligt at byggja alternativar íbúðir hjá sjálvsognarstovnum, feløgum og øðrum. Betri kor bæði fyri leigarar og útleigarar.

**Vinnupolitikkur**
Fleiri ídnaðarøkir og betri planlegging av ídnaðarøkjum. Havnirnar í kommununi skulu byta uppgávurnar millum sín: Góðshavn, Ferðsluhavn, Oljuhavn og Fríhavn.

**Familju- og sosialmál**
Barnafrádrátturin skal hækkast. Syst-kinaavsláttur í barnaansingini. Familjuavsláttur í svimjihøllini, við bussunum og øðrum kommunalum tænastum. Tey, sum hjálpa teimum heimleysu, skulu fáa øktan stuðul.

**Vegir og fer sla**
Ytri Ringvegur má gerast sum skjótast. Hetta við atliti til umhvørvið, t.d. traðirnar við Djúpagil. Innari Ringvegur verður longdur til Argir. Ætlan verður gjørd fyri sambinding av vestara og eystara ringvegi á suðursíðuni. Hetta við einari tunnil, har eisini parkeringskjallarar kunnu koma uppá tal. Bleyta ferðslan má tryggjast betur. Ábøtur mugu gerast við skúlarnar og onnur vandamikil støð. Tey súkklandi eiga at hava eina trygga koyribreyt ígjøgnum miðbýin.

**Ungdómurin**
Betri frítíðartilboð, t.d. at Margarinfabrikkin fær víðkaðan leiklut. Tey ungu undir 18 ár skulu hava nógv betri dansimøguleika, helst hvørja viku. Dansitíðirnar fyri hendan bólkin skulu broytast. Fyrr í dans og fyrr heim. Samstarvsráð (SSP) fyri tey, sum varða av teimum ungu, skal fáast at virka. Virkast skal fyri, at tónleikurin fær betri umstøður

**Ítróttur og frítíð**
Ítróttarfeløgini í kommununi skulu javnsetast. Ítrótturin er sera týdningarmikil fyri fólkaheilsuna og trivnaðin og skal vi gerast positivt og stuðlandi.

**Býráðsumsitingin skal virka betur**
Býráðið skal sjálvandi virða sínar egnu byggisamtyktir og samstarva væl við landsmyndugleikar og fakfeløg, so sleppast kann undan teimum gølum og órógvi, sum hava verið í seinasta valskeiði. Borgararnir skulu fáa møguleika at koma til orðanna við sínum ynskjum og uppskotum. Hetta fyri at betra um trygd og trivnað. Hetta kann gerast við t.d. einari heimasíðu. Býráðið skal kunna borgararnar betur um, hvat fyriferst í býráðsarbeiðinum.

**Peningurin skal fylgja við uppgávunum**
Nú fleiri uppgávur skulu leggjast út til kommunurnar at umsita, skal býráðið ansa eftir og krevja, at nøktandi fígging fylgir við.

**Politivi tøkurnar fyri kommununa skulu dagførast**
Politivi tøkurnar eiga at endurskoðast og dagførast, so at tær eru í samsvari við nútíðina; eitt nú kavarudding og ólevnaður.

# X vi lista D

Sjálvstýrisflokkurin

FØROYAPRENT - TEL. 314 555